# Hugarensl

NICOLINA
JENSEN BEDER



Í F. F. blaðnum nr. 360 hevur Ó eina grein, ið hann kallar »**Citatfalsan hjá Fagnaðargonguni** - eitt ískoyti til Jenis av Rana«, sum hevði grein um sama mál í Sosialinum 6. februar. Her verður endurgivið úr blaðnum: »Í blað nr. 361 høvdu vit eina grein m.a. um Martin Niemøller. Her endurgóvu vit hesi hansara kendu orð: »Tá ið nazistarnir tóku kommunistarnar, segði eg einki, tí at eg var ikki kommunistur. Tá ið teir tóku jødarnar, segði eg einki, tí eg var ikki jødi. So tóku teir fakfelagsovastarnar. Eg segði einki, tí at eg var ikki limur í nøkrum fakfelag. »Falsanin: So komu teir eftir teimum samkyndu, men eg tagdi, tí eg var ikki samkyndur. At enda tóku teir meg, men tá tordi eingin at klúgva í tvey longur. Í hesum føri haldi eg bæði við Ó. og Jenisi. Tá ið endurgivið verður, eigur ein av halda seg til sannleikan. At tey samkyndu júst vóru ein skrásettur bólkur í týningarlegunum, er ein onnur søga.

Um at endurgeva rætt. Í januar hevði Jenis av Rana eina grein í bløðunum við heitinum. »Kennir tú frásøgnina um Lot«. Jú, hana havi eg lisið fleiri ferðir, og er hon fyri mær ein himmalrópandi mótsøgn, tá talan er um faðirkærleika. Birita Lamhauge Jóansdóttir og Eivind O. Simonsen svaraðu aftur við sera væl valdum orðum, har støðið teirra eisini varð tikið úr Bíbliuni. Tey endaðu við spurninginum. Kanska Jenis er maður fyri at geva okkum eitt svar?

Svarið, ið tey fingu frá Jenisi var hetta: **p.s.** Longu dagin eftir fyrstu grein mína skrivaðu tveir lesarar um kunnleika sín til Lot. Àheitan mín til tykkum báðar er: Haldið á at lesa Bíbliuna, havið eitt opið sinni og biðið Heilaga Andan hjálpa tykkum at skilja tað, tit lesa. Tá hava tit eitt spennandi og ríkt lív at síggja fram til. Fyri mær kundi hetta svarið eins væl verið: »Goddag mand, økseskaft«.

Grein tvey hjá Jenisi: »Jesus og frásøgnin um Lot«.

Fyrr í vikuni endurgav eg part av frásøgnini um Lot, sum vit lesa hana í kap. 13 í Bíbliuni. Lættari er at fylgja við, um greitt verður frá, hvaðani í Bíbliuni skriftstøð verða tikin. Hetta er væl úr Fyrstu Mósubók. Kap. 13, har sagt verður frá, at Ábraham og Lot skiljast. Seinri í greinini stendur: Síðan heldur Jesus á við áminningini um at vera til reiðar, tann dag menniskjasonurin opinberast:

*…ta nátt skulu tvey vera í eini song; annað skal verða tikið við, og annað skal verða latið eftir.* Ikki stendur frágreiðing um, hvaðani hettar er tikið, og tí spyrji eg? Er hetta rætt endurgivið?

Í Bíbliu mínari stendur hjá Luk. 17. akp. 34. vers. *Eg sigi tykkum: Í teirri nátt skulu tveir menn vera í eini song; annar skal verða tikin við, og annar latin eftir.* Ikki ætli eg mær at blanda samkynd upp í henda spurning. Stendur tað, sum Jenis greiðir frá, aðra staðir? Og hví er málburðurin ikki eins? Vónandi er tað ikki so, at menn nú fara at málbera seg, sum teimum lystir.

Mær rennur til hugs eina ólavsøkuaftan í sekstiárunum. Hugnaløta var á Háskúlanum aftan á kappróðurin. Við kaffiborðið høvdu tríggir mans orðið. Niels Winther Poulsen tosaði um háskúlarørsluna, Sigurð Joensen um fronsku kollveltingina og Brimnes prestur um Bíbliuna. Hann greiddi millum annað frá, at Bíblian varð skrivað langt aftaná Jesusar deyða, og at tað var ymist, ið ein kundi seta spurningar við, eisini tí tað vóru ymiskar umsetingar. Eg má siga, at fyri meg var hetta eitt nýtt sjónarmið. Eg, sum var uppvaksin millum kirkju og missiónshús, hevði bara tikið ímóti uttan at seta spurnaðartekin við nakað. Í fyrstuni gjørdi hetta meg eitt sindur ørkymlaða, men sum fráleið helt eg, at Bíblian gjørdist enn meira áhugaverd.

Jakob Appel háskúlastjóri og kirkjuministari 1922 gav eina sera góða lýsing av J. C., ið var undanmaður hansara. J. C. var det mest beskedne menneske og personligt uegenyttigste menneske, man kunde tænke sig. **Men magt ville han, fordi han var sikker på, at det, han ville, var også det, Vorherre ville.** Út frá tí, ið skrivað hevur verið um tey samkyndu hesa seinastu tíðina, haldi eg, at vit eiga fleiri, ið kundu fingið sama skoðsmál sum J. C. Um vit trúgva, at Gud er til, mega vit eisini trúgva, at ein og hvør av okkum eru myndaði í Guds mynd, við teimum ymisku eginleikum, vit fingu í vøggugávu.

Ole Wick vísti á, at vit áttu ein bólk, ið ikki var góðkendur í samfelag okkara. Hann nýtti flaggið til at gera vart við hetta. Andans hooligans løgdu í vaðið. Tá ið hann síðani var so óskikkiligur at tekna eina svarta bók afturat, varð hann meldaður.

Ein sending í Lindini um Ole Wick og hansara óskikkiligheit var eftir mínari meining niðanfyri alt lágmark. Eg má siga, eins og ein gomul kona segði, tá ið hesar nýggju andaligu rørslurnar floymdu yvir í Føroyum: »Mær dámar ikki, at gud verður tikin av ræði«.

Ein ótrúligur dupultmoralur er eisini í hesum samanhangi. Fyrstu ferð, eg hoyrdi um Jesus-kaku, var seinasta valkvøld. Greitt varð frá í bløðunum, at tá ið upp var talt og Miðflokkurin fekk sínar menn, fingu vit kaffi og Jesus-kaku. Eg hevði ikki hoyrt hetta heitið fyrr og fór tí at spyrja, hvat ið hetta var fyri ein kaku. Jú, hetta var nakað nýtt, ið tey, ið høvdu samhuga við Miðflokkin, vóru farin at brúka. Skriftstøð vórðu sproytaði við glasur á kakuna. Havi hoyrt frá fólki, ið hevði verið til eina fermingaveitslu, at ein kaka stóð á borðinum, prýdd við einari opnari Bíbliu. Er hetta ikki at vanvirða Guds orð og Bíbliuna, so skilji eg einki.

Sjálv havi eg ofta hugsað um hesa mótsøgn, at tey flestu vilja til himmals eftir egnari uppskrift, uttan at kunna semjast her á jørð. Í einum brúdleypi í Norðoyggjum fekk eg svar uppá henda spurning. Hetta var fyrst í nítiárunum; vit vóri nýggj í Ónagerði og vistu lítið um, hvar ið hvør hoyrdi heima. Við brúdleypsborðið fekk eg ein fittan, ungan mann undir høgru lið. Vit skiftu orð um mangt og hvat, men so fekk hann tað hugskot, at hann skuldi fortelja mær, hvar tey ymisku hoyrdu heima. Vit sótu væl fyri, so lætt var at fylgja við, tá ið hann vísti mær á teir ymisku persónarnar, og hann tók teir í raðfylgju. Hasi hoyra til adventistarnar, og síðani nevndi hann navni á samkomunum ið tey ymisku hoyrdu til, meðan hann peikaði á tey. Emmaus - Solo Deo Gloria - KFUM - baptistarnar og kirkjuna. Eg sigi tá við hann, so er at vóna, at vit semjast, áðrenn vit fara foldum frá. Nei, svaraði hann, tað er ikki neyðugt, tí tað stendur í Bíbliuni. Í faðirs míns húsi eru mangir bústaðir. Var tað ikki so, hevði eg sagt tykkum tað; tí at eg fari burtur at tilbúgva stað fyri tykkum. Joh. 14 kap. 2 vers. Ein nýggj tulking, ið ikki var runnin mær til hugs. Sig so, at nakað er nýtt undir sólini. Nei, tá haldi eg heldur við Jóan Chr. Poulsen.

*Hvar var Guðs jørð eitt fagnarstað*
*at búgva á, tá bróðurlag*
*var hvørt eitt stað at finna;*
*og klandur innivist ei fekk,*
*men fjónað millum húsa*
*gekk*
*og einki fekk útinnað.*

Nr. 517 í Sálmabók
Føroya Kirkju

# Miðnámsskúlar sum mentanardeplar

HEIDI
PETERSEN
Løgtingskvinna



**– Ískoyti til orðaskiftið um miðnámsútbúgvingar og miðnámsskúlar**

Haldi tað vera rætt og skilagott at seta sum mál, at øll í Føroyum skulu hava eina miðnámsútbúgving. Samstundis er eisini neyðugt at víðka um hugtakið »miðnámsútbúgving«.

Higartil hava vit í Føroyum sæð miðnámsútbúgvingar sum tær bókligu útbúgvingarnar vit bjóða á verandi miðnámsskúlunum.

Hesar útbúgvingar fata um Studentaskúla (ST) og Hægri Fyrireikingar (HF), sum eru almenngymnasialar útbúgvingar, har tú fyrst og fremst hevur almennandi lærugreinir, ið gera teg føran fyri at fara undir hægri framhaldslestur, um tú annars lýkur tey upptøkukrøvini, sum útbúgvingarstovnurin setir, og Hægri Handilsskúla(HH), Hægri Tøkniskúla (HT) og Hægri fiskivinniskúla (HIF) sum eru yrkisgymnasialar útbúgvingar, har tú umframt almennar lærugreinir eisini hevur lærugreinir, ið fyrireika teg til bæði at fara undir framhaldandi hægri vinnulívsútbúgvingar (handilsútbúgvingar og tekniskar útbúgvingar) og til at arbeiða í vinnulívinum.

Afturat hesum vit í dag nevna sum miðnámsútbúgvingar, eiga vit eisini at leggja allar tær yrkisútbúgvingar sum vit annars kenna í dag, og víðka um útboðið av útbúgvingum.

Hesar útbúgvingar fata um Sjóvinnuútbúgving, sum gevur næmingunum eina grundleggjandi verkliga og ástøðiliga vitan um viðurskifti á sjónum og umborð á skipi.Undirvísingin leggur dent á at geva næmingunum vitan um trygd á sjónum, arbeiðsumhvørvi, viðlíkahald og verkligan sjómansskap, soleiðis at teir eftir lokið skeið kunnu mynstra sum dekkarar.

Heilsuútbúgvingar eru nýggjar útbúgvingar, ið byrjaðu á heysti 2001. Útbúgvingarnar hava til endamáls hvør sær at geva næmingunum førleika at røkja uppgávur á almanna- og heilsuøkinum. Útbúgvingin til heilsuhjálpara er skipað sum ein grundútbúgving (eitt støðisár), ið tekur 1 ár og 3 mánaðir. Eftir lokið støðisár er møguleiki fyri at halda fram 1 ár og 10 mánaðir í útbúgvingini til heilsurøktara.

Eisini er møguleiki at taka yrkisútbúgving innan fiskavirking og aling. Talan er um tvey sløg av yrkisútbúgvingum, ávikavist innan flakavinnuna ella alivinnuna. Hesar útbúgvingar verða skipaðar sum arðar handverkaraútbúgvingar, har fyrst verður gingið í skúla í eitt støðisár og síðani verkliga upplæring á virki har næmingurin hevur lærusáttmála.

Umframt hesar útbúgvingar hava vit okkara siðbundnu Handverkaraútbúgvingar, sum fata um eitt vanlig handverkarayrki vit kenna eitt nú snikkara-, bilsmið-, el- , hárfríðkan- og maskinútbúgving.

Síðani hava vit vanligu Handilsskúlaútbúgvingina, sum gevur førleika til fyrisiting-, handil-, skrivstovuyrki umframt onnur tilboð sum hesin skúlin bjóðar.

Tað hevði verið skilabest at sam- og umskipað allar útbúgvingarnar soleiðis at allar fingu heiti miðnámsútbúgving og við tíðini komu undir sama skipanarliga hátt.

Á sama hátt sum vit nú umskipa allar okkara víðari útbúgvingar so tær verða á fróðskaparstøðið.

Fyri at lyfta samfelagið á eitt hægri støðið, fyri at tryggja vælferðina í framtíðini og fyri at vera við í kappingini á jøvnum føti við allan heim, eiga allar hesar útbúgvingar at verða dagførdar og nútímansgjørdar soleiðis at tær lúka altjóða fakligu krøvunum innihaldsliga og tøkniliga.

Hetta verður tað stóra takið, og heppin hond skal til, tá slíkt skal gjøgnumførast, tí á leiðini liggja nógvir snávingarsteinar. Haldi tað vera neyðugt við breiðum politiskum uppbakningi og samstarvi, um slíkt skal eydnast á fullgóðan hátt.

**Kreativiteturin við í útbúgvingartilboðini.**

Í miðnámsútbúgvingunum vit bjóða ungdóminum í dag, kunnu vit siga at skapanarevnini eru útihýst. Vit mangla ikki bara at rúma kreativitetinum hjá hesum bólki av ungfólki, men eisini at geva teimum avbjóðingar og útbúgvingar har tey kunnu fáa amboð og víðarimenna øll tey ótrúðligu evni hesi fólk hava.

Miðnámsútbúgvingar innan tónleik, sjónleik, málningalist, sniðgeving, kunningar og samskiftistøkni, sang og sangskriving, fyri at nevna nøkur av teimum listagreinunum sum vit eru vælsignaði við, men ikki geva fólki møguleika at dyrka.

Hetta tilfeingi eiga og skulu vit eisini nýta orku uppá í Føroyska útbúgvingarverkinum. Hesin kreativitetur kann ikki framhaldandi liggja uttan fyri tað lærurúmið vit í Føroyum bjóða okkara borgarum. Vænti at stórur partur av okkara framtíðar vælferð kemur at liggja í hondunum hjá tí skapandi fólkinum her á landið, og á altjóðapallinum er hetta ómetaliga tídningarmikið, tí her kunnu vit ósmæðin kappast við allan heim.

**Miðnámsskúlarnir sum mentanardeplar**

Grundin til at Tjóðveldisflokkurin vil hava miðnámsskúlar kring alt landið, eru fleiri.

Miðnámsskúlin er ikki bert ein skúli har ungfólk millum 17 og 20 ár fáa sær útbúgving. Nei, skúlin er eisini tann depilin sum skal taka sær av at útbúgva og endurútbúgva arbeiðsmegina kring landið.

Frá at virka í einum fiskiídnaðar samfelagið, til at arbeiða í vitanarsamfelagnum, verður neyðugt at styrkja førleikan hjá verandi arbeiðsmegi, soleiðis at hon kan taka framtíðar avbjóðingar upp.

Eisini er skúlin tann mentanardepilin, sum skal vera við til at menna øki og gera tað spennandi og áhugavert fyri allar samfelagsbólkar at búseta seg í einum øki. Skúlin eigur at vera samskiftis depilin hjá bygdini ella býnum, og eisini verða tann sum kann geva íblástur uttan úr heimi. Staði har nýggir tankar spretta og tiltøk vera sett í gongd, til gagns fyri borgararnar og menningina av øllum økinum skúlin er í. Stutt sagt skal skúlin vera tann mentanardepilin ella mentanarhúsið har alt øki sígur sær megi og merg.

Við hesum í huga mæla vit til at miðnámsskúlar, ið verða víðkaðir til at verða mentanardeplar, har endurútbúgving av arbeiðsmegini í Føroyum eisini verður hýst, samstundis sum teir eru mentanarhús í økjunum, verða lagdir kring alt landið. Í Noroyggjum verður miðnámsskúli við denti á tøkni útbygdur, miðnámsskúli við denti á fyrisiting, handli og skrivstovu og student verður í Eysturoy, miðnámsskúli við student-, tøkni- og fyrisiting, handli og skrivstovu verður í Tórshavn, Miðnámsskúli við fiskivinnu- og umhvørvi verður í Vestmanna, miðnámsskúli við listagreinum og ítrótti verður í Sandoy, í Vágum verður miðnámsskúli við matvøruframleiðslu og ferðavinnu sum høvuðsgrein og í Suðuroy verður miðnámsskúli við HH og heilsuútbúgving sum serøki.